## DAGSINS MEINING

# Pensiónsmálið hastar!

Tað vóru sera áhugaverd tíðindi frá aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag um dagarnar, at tað nú eru ítøkiligar ætlanir um at leggja lívstryggingarnar hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag saman. Nú skal spurningurin eisini samtykkjast í Havnar Arbeiðsmannafelag. Lívstryggingin veitir endurgjald við deyða og álvarsliga sjúku og Ingeborg Vinther, forkvinna í FA sigur, at vera tryggingarnar hjá báðum feløgunum samanlagdar, verður puljan av tryggingartakarunum nógv størri, og tað fer at geva báðum feløgunum eina væl bíligari og eina betri trygging eisini.

Sum kunnugt er pensiónsspurningurin ein tann størsti spurningurin í dagsins samfelag og eigur hesin tí eisini at verða givið nógv størri gætur í almenna orðaskiftinum sum heild. Landsstýrið hevur boðað frá, at tað politiskt verður miðað ímóti eini samfingnari skipan í trimum pørtum. Hesir partar eru: fólkapensiónin, samhaldsfasti og so privatar pensiónir ella samlagspensiónir, sum verða teknaðar gjøgnum fakfeløgini. Tað er tí eitt sera týðandi stig, sum HA og FA hava tikið, og tað er at vóna, at henda ætlan kann gerast veruleiki. Eydnast henda ætlan verður hon ivaleyst til fyrimunar fyri limirnar í báðum feløgum. Tað besta hevði sjálvsagt verið, um øll feløgini á privata arbeiðsmarknaðinum tóku seg saman í eina pensióntrygging.

Tað eru nú nógv ár síðan, at Havnar Arbeiðsmannafelag við Karl Johansen á odda sum fyrsta verkamannafelag fór undir at seta í verk pensiónsskipan fyri limirnar. Ikki vóru øll fegin tá, og skipanin fekk nógvar atfinningar. Hesar gingu uppá, at betri var at fáa gjaldið uppá lønina enn til eina pensiónskipan. Eftirtíðin hevur prógvað, at hetta var ein sera klók avgerð, sum hevur verið limunum til mikið gagns. Nú stendur eftir, at tað almenna ger sín part lidnan. Tað tykist ganga striltið við hesum partinum. Tíðin gongur, og val verður um tvey ár. Jú nærri vit koma valinum, jú torførari verður at fáa slík mál sum pensiónsskipan í hús. Avvarandi myndugleikar mugu tí nú taka seg um reiggj og fáa pensiónslóggávuna i løgtingið sum skjótast t.v.s. í næstu tingsetu. Pensiónsmálið hastar!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skattapolitikkur

BÁRÐUR NIELSEN
landstýrismaður



**Samgongan setti sær sum mál at føra ein skattapolitikk við innihaldi, og nú tvey ár eru farin kann staðfestast, at hetta hevur eydnast**




Samgongan setti sær sum mál at føra ein aktivan skattapolitikk, ið skuldi virka arbeiðs- og búskaparliga vakstrarfremjandi og mett var, at hetta var alneyðugt fyri framhaldandi búskaparvøkstri og fyri at varðveita eitt høgt alment tænastustøði.

Nú vit eru farin inn í seinnu hálvu av valskeiðnum,og næsta stigi í skattaumleggingini er komið at virka, byrja úrslitini at síggjast. Skattaútrokningarnar yvir ymsu lønarbólkarnar vísa, at beinleiðis skatturin hjá øllum fakbólkum er lækkaður, og at lækkingin er rímiliga jøvn millum fakbólkarnar.

Myndin omanfyri prógvar heilt greitt, at hóast skattalættar hava verið givnir mestsum á hvørjum ári síðani kreppuna fyrst í 90-inum, er skattatrýstið á flestu lønarbólkarnar ikki lækkað merkisvert. Grundin til hetta er ein afturúrsigldur skattastigi, ið hevur viðført, at stóru lønarhækkingarnar í samfelagnum eru uppetnar í skatti.

**Skattanýskipan**
Landsskatturin er uppbygdur annaleiðis enn kommunuskatturin, ið er ein proportionalur skattur við einum botnfrádrátti, meðan landsskatturin er ein progressivur skattur, ið merkir, at skattasatsurin av síðst vunnu krónu hækkar alt eftir hvat ein hevur í inntøku.

Orsøkin til at mett var neyðugt at fáa eina nýskipan av progressiva skattastiganum er, at vit t.d. í 1984 kundu forvinna 2 ferðir eina arbeiðsmannaløn, áðrenn vit skuldu gjalda topskatt, meðan vit í 2003 einans kundu forvinna 80% av eini arbeisðsmannaløn.

Við teimum broytingum ið higartil eru framdar, sleppur ein arbeiðsmannaløn fyri fyrstu ferð í mong ár undan at gjalda toppskatt. Tað er ikki annað enn rætt og rímuligt eftir mínum tykki.

Málið er framhaldandi at gera skattaskipanina meira búskaparliga vakstrarfremjandi, og skal hetta gerast við at eisini miðalinntøkur skulu sleppa undan at gjalda topskatt.

# Løgtingsumboð fara fram, eins og tjóvur á nátt

FINNLEIF GUTTESEN
tryggingartakari



**At Javnara-og Tjóðveldisflokkurin, sokallaðir verjar hjá Palliba og Marsannu, nú ætla at geva helvtina aftur av tí, teir hava stolið í LÍV, er láturligt og grátuligt. At Sambandsflokkurin tekur undir við, at stjala LÍV frá tryggingartakaranum, vísur bert, hvar flokkurin stendur.**

LÍV er ein sjálvseigandi stovnur, sum tryggingartakararnir eiga og eingin annar. Men við einum pennastroki hevur løgtingið stolið hesa ogn frá Palliba og Marsannu.

Tað er ikki moralskir trupulleikar, ið hava fingið nøkur løgtingsumboð at seta uppskot fram um at geva, tryggingartakaranum í LÍV, eitt sindur av tjóvagóðsinum aftur, men bert trýst frá fakfeløgunum, og fyri atkvøður.

Við at stjala LÌV og gera tað til eitt partafelag, taka løgtingsumboðini og minka um tryggingarveitingarnar til Palliba og Marsannu, tað er fakta.

Umboðini í Løgtingið og Landsstýrinum hava ikki brúk fyri LÍV, tí tey eru tryggja í høvd og r...., tað er seinasta uppskoti um eftirløn besta dømi um.

**Leiðslan í LÍV**
Er tað bert nakrar nikkudukkur, ið sita í stýrinum og leiðsluni, – hví hava tey ikki fyri langari tíð síðani reist sak móti Landsstýri/Løgtingi, fyri at verja tryggingartakararnar?

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddi:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.